

**Dómarin tóktist fyrst at bríksla fyri mál, men síðan mest sum umbestemmaði seg**

*B36 hevði ikki stórvegis trupulleikar av HB framherjanum, Andrew av Fløtum*

Mynd: Álvur Haraldsen



# Andrew harmast

*Framherjin hjá HB heldur tað verða rættiliga harmiligt, at HB ikki vann dystin. Andrew av Fløtum var ikki heilt nøgdur við sítt egna avrik. – Tað skal ikki verða nøkur loyna, at tað gekk ikki heilt eftir vild hjá mær, men eg vil kortini fegnast um, at teir sum komu inn veruliga gjørdu mun. Eg haldi eisini, at tað var heilt uppiborið, at vit komu uppá 2-2 í seinna hálvleiki. Andrew heldur, at teir høvdu gott stýr á tingunum í fyrru hálvleiki, og tí var tað eitt sindur skakandi, at 1-0 leiðslan vendi til 1-2 aftaná eina stutta løtu.*

heris@sosialurin.fo

## Jákup á Borg:

# Vit skuldu fingið brotsspark

*Eftir dystin í Gundadali bleiv nógv tosað um tær báðar umstríddu støðurnar ímóti endanum, tá fyrst B36 fekk eitt mál kolldømt og síðani ikki fekk eitt brotsspark. Jákup á Borg helt í øllum førum, at B36 skuldi fingið brotssparkið, tá Hendrik Rubeksen setti fótin fyri Heina í Skorini, so hann datt inni í HB-brotsteiginum.*
*– Nú beint eftir dystin eri eg sjálvandi enn ógvuliga heitur. Sjálvandi kunnu dómarar gera feilir, men hetta vóru stórir feilir hesa ferð. Brotssparkið ímóti Heina kann væl dømast, tí tað er eingin grund til, at hann leggur seg soleiðis, sigur Jákup, ið tó ikki vil geva dómaranum skyldina fyri, at tað endaði við javnleiki.*
*– Nei, eg fari ongantíð í tann básin, at eg skal skylda upp á dómaran. Vit førdu 2-1 í fyrra hálvleiki og skuldu bara koyra tað heim í seinna hálvleiki, men tað kláraðu vit so ikki. Dysturin kundi farið báðar vegir, men hyggur tú at teimum síðstu fimm minuttunum, so høvdu vit nokk uppiborið betri. Eg rokni við, at vit eru teir, sum eru minni nøgdir við úrslitið.*

heris@sosialurin.fo